Tórshavn, hin 12. mai 2010
Málnr.: 403-201000336-1

**HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Útgáva 3
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing

## Heilsøla uttan virking

### Endamál

Keypa og selja pakkaðar og merktar matvørur til víðari sølu til smásølur, virkir, matstovur o.o.

**Hølir**

- Goymsla til turrvørur
- Køli- og frystigoymslur
- Skiftirúm og vesi til starvsfólk
- Matstað til starvsfólk
- Rúm ella bingja til burturkast
- Stað til returvørur
- Rúm, við skolivaski, til reingerðaramboð og reingerðarevni
- Kontór
- Bilar

**Innrætting**

Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd) og hølini skulu vera plaserað hóskandi, hvørt í mun til annað.

**Vegleiðandi innrætting**

- Goymslurúm til turrvørur.
- Køli- og frystigoymslur, møguliga deildar upp við hálvveggum, hillum e.l. soleiðis, at ymisku matvørurnar standa atskildar.
- Frostgoymslan skal hava sjálvvirkandi kuldaskráseting.
- Vesi, við forrúmi. Hondvask skal vera á vesinum ella í forrúminum.
- Skiftirúm til starvsfólk. Skiftirúm kann verða í forrúminum til vesi. Plaseringin skal vera soleiðis, at arbeiðsfólk ikki fer ígjøgnum matfram leiðslurúm ella onnur "rein" rúm í egnum klæðum/yvirklæðum.
- Matstað til starvsfólk skal vera burtur frá goymslunum. Um starvsfólkunum er loyvt at roykja, skal hetta verða í rúmi fyri seg.
- Eitt ávíst stað skal vera til returvørur, so hesar ikki koma í samband við reinar vørur.
- Eitt rúm ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, skal vera til reingerðaramboð og reingerðarevni. Skolivask til spillivatn frá reingerðini.
- Kontór til umsiting.
- Bilurin skal vera soleiðis innrættaður, at flutningur av mat fer fram á ein heilsufrøðiligan fullgóðan hátt. Bilurin skal kunna vaskast/spulast innan. Bilar til flutning av køli- og frystivørum, skulu hava køli- og/ella frystianlegg.

**Útbúnaður**

- Allur leysur útbúnaður, amboð, el-kaðal o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum á hóskandi hillum e.l., eisini reingerðaramboð.

**Burturkastsskipan**

- Burturkast skal beinast út úr arbeiðshølum minst eina ferð dagliga.
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkastið.
- Burturkastið skal flytast við góðkendari skipan (KOB/IRF) .
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast / vaskast.

**Reingerð**

- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein eftir tørvi.
- Skrivlig reingerðarætlan skal vera og henda skal fylgjast.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Persónligt reinføri**

- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað**

- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at matvørur ikki dálka hvørja aðra ella á annan hátt eru orsøk til, at matvørurnar spillast skjótari, oyðileggjast ella dálkast av nærumhvørvinum.
- Køli-/frystiketan skal ongantíð brótast.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdu

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.